Mannagongd fyri dómarar í meistaradeildunum í Føroyum

Dómarar eiga at vera í svørtum buksum og dómarablusu frá FBF

Dómararnir skulu møta 35 min. áðrenn dystarbyrjan.

Dómararnir skulu tryggja sær, at alt er á staðnum, sum skal brúkast til dystin, t.e.:

- Bóltar, net, stengur, dómarastólur, skrivari, skrivaraborð, máltalva og dystartalva
- Um linjuverjar eru til dystin, minnist til fløggini

17 min. til dystarbyrjan: Nethæddin verður kannað.

15 min. til dystarbyrjan: Lutakast: Áðrenn lutakast, spyr altíð um liðini vilja hita upp saman frammi við netið. Væl vitandi, at hetta er vanligt í Føroyum, so kunnu vit venja okkum við, at møguleiki er fyri at hita upp hvør sær.

Brúka altíð mynt til lutakastið.

Vinnari av lutakasti:	Tapari av lutakasti:
Servu	Síðu
Móttøku	Síðu
Síðu	Servu ella móttøku

Tá ið lutakastið hevur verið, skulu liðskiparar og venjarar skriva undir dystartalvuna.

13 min. til dystarbyrjan: 10 min. upphiting. Í dag skulu liðini sjálvi skipa fyri upphiting, t.v.s., at dómari eigur ikki at floyta fyri síðuskifti ella servu. Tó kann leggjast afturat, at dómarar kunnu vegleiða liðini, til tey hava funnið útav mannagongdini.

Meðan liðini hita upp, skal 1. dómarin geva møguligum linjudómarum og bóltlangarum vegleiðing: Hvar teir skulu standa, hvussu teir skulu røkta teirra uppgávu o.s.fr.

Meðan 1. dómarin vegleiðir hjálparfólkið, hyggur 2. dómarin eftir upphitingini hjá liðunum.

10 min. til dystarbyrjan: 2. dómarin heintar rotatiónsseðlar frá liðunum til fyrsta settið. Tá hesir eru latnir 2. dómara, kunnu teir ikki broytast. T.v.s., at um onkur verður skaddur undir upphiting sum stendur at byrja inni í fyrsta setti, má venjarin gera eina vanliga útskifting.

3 min. til dystarbyrjan: Upphitingin eigur at enda, og liðini gera seg klár at fara á vøllin.

Ein flogbóltsdystur eigur altíð at byrja til ásettu tíð, og tá 1. dómarin floytar til dyst, skulu liðini fara beina kós á vøllin, og ikki á baklinjuna sum áður.

0 min. til dystarbyrjan: 1. dómari floytar til servu.

Minnist altíð til floytu, kort og mynt. Hava tit bóltpumpu og manometur, er tað sera gott at hava við sær.

Við flogbóltskvøðu,

Jan Hentze,
samskipari